## Føroya Tele samstarvsavtalu við amerikanskt KT-felag

Stjórin á Google, Eric Schmidt, sigur, at í framtíðini ber til at fáa ókeypis fartelefonir, um brúkarin samstundis játtar at taka ímóti lýsingum. Hetta segði hann í samrøðu við Reuters. Grundgevingin er, at fartelefonin í dag er ein somikið fastur partur av gerandisdegnum hjá brúkarunum, at hetta er ein alt meira upplagdur lýsingarmiðil. Í Japan hevur Google í løtuni eina royndarskipan saman við japanskum televeitarum.

## FT Samskifti

Summi undrast kanska á, hvat FT-samskifti er. Á heimasíðuni hjá Føroya Tele stendur soleiðis greitt frá dóttirfelagnum hjá Føroya Tele:

– P/F FT Samskifti er dótturfelag hjá Føroya Tele. Í nýggja felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarútgerð fyri fastnetstelefoni og breiðband. Broytingin til nýggja dótturfelagið er við til at tryggja eins treytir fyri kappingarneytarnar á marknaðinum. Hesir nýggju karmarnir geva nýggjar møguleikar at veita betri og bíligari tænastur til kundarnar. Richard Mortensen er stjóri í FT Samskifti. Í felagnum starvast uml. 100 fólk.

Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum "Føroya Tele".



*Í teimum ymsu hølunum í Klingruni vóru framsýningar, har ið IP-tøkni varð sýnd fram*

# Helt fyrilestur um ommuna

**– Samskiftis - og fluttningsmøguleikarnir í dag hava útjavnað munin millum útjaðara og miðsavningarøki, sigur Henrik Dahl, sum helt fyrilestur í Klingruni hósdagin**



VINNULÍV
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Annar av tveimum fyrilestrarhaldum á evnisdegnum hjá Føroya Tele var Henrik Dahl. Henrik er útbúgvin sosiologur og heldur nógvar fyrilestrar um árið.

Henrik hevur skrivað eina bók, har ið omma hansara er høvuðspersónur. Omman er júst deyð eftir at hava livað í 101 ár. Henrik heldur, at omman hevur upplivað nógv meira enn hann, hóast vit halda, at okkara heimur broytist so skjótt.

– Vit fáa betringar og altsamt fleiri hentleikar, men tað henda ongar kollveltandi broytingar. Omma mín hevur upplivað mestsum alar tær kollveltandi uppfinningarnar og tær týdningarmiklu hendingarnar, segði Henrik millum annað.

Henrik varð bjóðaður til Føroya av einum gomlum lestrarvinnmanni. Hann er glaður um møguleikan og undrast á, at vit eru so væl fyri.

– Eg havi ofta flogið uppiyvir Føroyum, men hetta er fyrstu ferð, at eg eri her. Tað er ótrúligt, at eitt so fjarskotið land skal vera so væl fyri. Samskiftis- og fluttningsmøguleikarnir í dag hava útjavnað munin millum útjaðara og miðsavningarøki.

– Eg búði úti á landinum sum barn. Eg mátti koyri 6 tímar í toki, um eg skuldi keypa eitt blað. Hetta vísir, hvussu nógva alt er broytt, hugleiddi Henrik.



*Fólk sita áhugað og lurta, meðan Henrik Dahl heldur fyrilestur*



*Nógv fólk høvdu leitað sær niðan í Klingruna hósdagin til evnisdagin hjá Føroya Tele*